Mynd: BP

# Og so kavaði oljuprísurin aftur

**Jógvan Hugo Gardar**

26.10.2015 - 23:37

Oljan.fo

Oljuprísurin orkaði ikki at lyfta seg í dag, men lækkar í staðin. Orsøkin er millum annað at talið á boripallum í USA helt sær í farnu viku, í staðin fyri at minka. Hetta ger at USA heldur fram at framleiða nógva olju til ein marknað sum longu hevur goymslur sum eru á tremur við olju.

Amerikanska lættoljan WTI kostar í dag 43,93 dollarar fyri fatið, tað er ein lækking uppá 1,79 prosent. Norðsjóvaroljan Brent liggur í kvøld á 47,53 dollarar, og tað er á leið tað sama sum tá marknaðurin lat upp í morgun.

Prísurin er lækkaður javnt síðani áðrenn vikuskiftið tá prísurin táttaði í 50 dollarar fyri fatið av Brent-oljuni.